# Verður tungt at fáa tað at hanga saman



*Smápartafelagið, sum eigur gamla Dúgvuberg, fer ikki at seta gomlu maskinuna í nýggja bátin. – Tað halda vit kortini ikki vera ráðiligt, sigur reiðarin, Dánjal Jacobsen*

**– Fer tað at ganga væl, fáa vit raksturin at hanga saman, men gongur tað ikki væl, verður tað trupult, sigur Dánjal Jacobsen, reiðari í Vestmanna, ið eigur annan av trolbátunum, sum standa á Tórshavnar Skipasmiðju**

NÝBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsmorgunin kom Tjaldrið á Vestmanna við trolbátinum, Dúgvubergi, sum smápartafelagið, Dúgvuberg í Vestmanna, eigur. Teir høvdu fingið maskinskaða, og nú teir noyddust at bróta túrin av, høvdu teir einar 100 kassar inni, sum er góð 10.000 pund.

Tað er sama felag í Vestmanna, sum eigur Dúgvuberg, ið eigur annan nýbygningin, sum nú stendur á Tórshavnar Skipasmiðju og ætlandi verður liðugur flaggdagin, 25. apríl komandi ár.

Smápartafelagið í Vestmanna keypti Dúgvuberg úr Klaksvík í fyrraári. Báturin, sum er bygdur í 1941, er úr timbri, og maskinan er frá fyrst í áttatiárunum.

Dúgvuberg hevur trolloyvi á landleiðini um sumrarnar, men roynir annars uttanfyri hin partin av árinum.

### Góðir bátar

Dánjal Jacobsen, reiðari, heldur, at nýggju skrokkarnir, sum Tórshavnar Skipasmiðja hevur latið byggja í Pólandi, eru snøggir á at líta.

– Tað var soleiðis, at vit komu ikki beinanvegin uppí hesa ætlan. Skrokkarnir vóru faktist liðugt teknaðir, áðrenn vit komu inn í myndina.

Hann sigur, at við at byggja tveir skrokkar samstundis, kundu bátarnir helst byggjast nakað bíligari.

– Tað er Tórshavnar Skipasmiðja, sum eigur útkastið, og eg haldi, at teir eru komnir væl frá hesum arbeiði.

Dánjal heldur, at Hans Andrias Poulsen á Toftum, sum byggir eina nýggja Hansu Mariu, hevur verið meira við í ætlanini, enn hann sjálvur hevur verið.

– Nú slíkir bátar eru bygdir í Íslandi, hevur Tórshavnar Skipasmiðja helst viljað verið við í útboðnum, og hetta hevur so verið teirra boð uppá hesa bátastøddina, sum gongur undir reglurnar til landleiðina.

Dánjal vísir á, at nýggju skrokkarnir líkjast teimum størru skipunum í útsjónd, og hann heldur, at teir mest eru líkir ísfiskatrolaranum, Dalenni, sum í sínari tíð varð bygdur til Strendur.

– Nýggju skrokkarnir hava tveir trolbanar, sum ganga fram undir stýrhúsið. Spurdur, um monnum dámar betur at hava trolbanar enn troltrumlu til trolið, sigur hann:

– Nei, tað dugi eg ikki at siga. Tað eru ymiskt, sum monnum dámar. Nøkrum dáma betur, at trolið verður hálað inn á dekkið; øðrum dámar líka væl, at trolið verður hálað uppá eina troltrumlu.

Hann heldur tó, at fyrimunirnir við trolbanum er, at tú sleppur betur fram at trolinum, um okkurt er at gera.

### Verður tungt

Á Tórshavnar Skipasmiðju hava tey upplýst, at nýggju trolbátarnir fara at kosta einar 9-10 miljónir krónur, tá ið teir eru klárir at fara til fiskiskap. Hetta er nakrar miljónir meira enn trolbátarnir, sum íslendingar eitt nú hava bygt til Leirvíkar, kosta.

Spurdur, hvørjar vónir hann hevur um raksturin, sigur Dánjal:

– Fer tað at ganga væl, fáa vit raksturin at hanga saman, men gongur tað ikki væl, kann tað gerast trupult, sigur hann.

Dánjal sigur, at teir í fyrstani hugsaðu um at taka maskinuna úr Dúgvubergi og seta hana í nýggja bátin, men hesar ætlaninar eru nú sleptar.

– Maskinan í nýggja bátinum verður ein Caterpillar 496 hk., og eg havi skilt, at maskinan í nýggju Hansu Mariu verður av slagnum, Scania.

Dánjal Jacobsen sigur, at 4-5 mans eru við gamla Dúgvubergi, sum verður lagdur, tá ið nýggi báturin kemur í flotan – og 5 mans verða knýttir at nýggja bátinum.



*Nýggi báturin kemur í flotan fyri gamla Dúgvuberg, sum Tjaldrið sleipaði til lands í gjár við maskinbreki*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

# Dýrur umgangur hjá Vesturbúgvanum

**Tað fer at kosta nakrar miljónir í nýggjari maskinu, arbeiðslønum og mistari fiskitíð hjá trolaranum, Vesturbúgvanum úr Vestmanna, sum neyvan verður klárur at fara aftur til fiskiskap fyrr enn um mánaðarskiftið, november/desember. – Hetta er ein katastrofa hjá okkum, sigur reiðarin, Dánjal Jacobsen**



*– Hetta er ein katastrofa hjá okkum. Eg veit faktist ikki, hvat hetta fer at kosta okkum, tí tað kemur alla tíðina okkurt aftrat, sigur reiðarin, Dánjal Jacobsen í Vestmanna*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NÝGGJAN MOTOR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hendi, 13. august í ár. Ein bóltur í maskinuni slitnaði. Riva kom í blokkin, og rivur komu eisini í krumptapsaksilin.

Soleiðis kann tað ganga, tá ið tá gongur illa. Hetta noyðist reiðarin á Vesturbúgvanum, Dánjal Jacobsen, at ásanna.

Hann sigur, at í fyrstani var ikki ætlanin at skifta maskinuna út, men tað vísti seg, at rivurnar í krumptapsakslinum vóru so djúpar, at tað ikki varð hildið vera skilagott at slípa tær burtur.

– Vit tóku tí avgerð um at skifta maskinuna út.

Dánjal sigur, at Vesturbúgvin, ið teir fingu sum nýbygning í 1992, hevði ein Deutze MWM, sum var 1399 hk. Nýggja maskinan verður ein Wartsila av somu stødd sum hin gamla.

### Katastrofa

– Hetta er ein katastrofa hjá okkum. Eg veit faktist ikki, hvat hetta fer at kosta okkum, tí tað kemur alla tíðina okkurt aftrat.

Hann sigur, at sjálv maskinan kostar 2,3 miljónir krónur at keypa, men síðan verður neyðugt at skifta ymiskt annað út, eitt nú botnventilarnar. Aftrat hesum kemur so arbeiðslønin og mist fiskitíð.

– Tað hevði verið bíligari og skjótari at umvælt gomlu maskinuna, men við atliti til, hvat hetta kortini hevði kostað, hildu vit tað vera best at skifta maskinuna út við eina nýggja. Haraftrat kemur, at hetta modellið av maskinu verður ikki gjørt longur á verksmiðjuni.

Spurdur, um slík umvæling, íløga og mist fiskitíð á nakran hátt er tryggjað, sigur reiðarin, at einasti parturin, teir fáa endurgoldið, er tað, sum tað hevði kostað at umvælt gomlu maskinuna.

– Men hetta er bert ein lítil partur av øllum, sigur hann.

### Mist fiskitíð

Dánjal Jacobsen sigur, at Vesturbúgvin í minsta lagi kemur at missa hálvan fjórða mánaða í fiskitíð, og tað er ógvuliga harmiligt, nú so væl hevur verið at fingið av hampiliga góðum upsa.

– Vit vænta kanska at fáa ein ella tveir túrar aftrat í hesum árinum, um tíðarætlanin heldur, og alt beinanvegin fer at virka, sum tað eigur, sigur hann.



# Fíggjarstovnar fáa felags lóggávu

**Í hesum løgtingsárinum skal ein nýggj lóg um fíggjarvirksemi setast í verk. Lógin umfatar fleiri ymisk sløg av fíggjarstovnum**

BÚSKAPUR

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at ein nýggj lóg um fíggjarvirksemi skal setast í gildi í Føroyum. Talan er um hina donsku »lov om finansiel virksomhed«.

Lógin umfatar vanligar peningastovnar, tryggingarfyritøkur, virðisbrævameklarar og íløgufeløg, og hon kemur í staðin fyri eina røð av lógum, ið hevur regulerað virksemið í hesum stovnum. Endamálið við at seta hesa lógina í verk er sambært Fíggjarmálaráðnum at gera lógarverkið einfaldari, og harnæst er ein dagføring hóskandi nú.

Føroya Sparikassi heldur tað vera neyðugt at dagføra lógarverkið hjá fíggjarstovnunum í landinum.

– Sum heild verða lógirnar, ið stýra okkara virksemi dagførdar ov seint, og tí eru vit eftirbátar í mun til peningastovnar í danska fíggjarheiminum, sum vit eru partur av. Okkara ynski er, at dagføringar frameftir verða framdar samstundis í Føroyum og í Danmark, og at okkara myndugleikar tí eru við og gera sína ávirkan galdandi, tá broytingar eru á skránni í Danmark, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

Sum er virka sparikassar og bankar í Føroyum eftir einari danskari lóg, sum danir seinast dagførdu í 2000.

Ein bólkur við føroyskum og donskum embætisfólkum skal um ársskiftið verða liðugur við eitt arbeiði, ið skal bera í sær, at eitt lógaruppskot um fíggjarvirksemi í Føroyum skal leggjast fyri Løgtingið og Fólkatingið í inniverandi tingári.

*Kelda: www.sparikassin.fo*

# Oljan kann røkka 60 dollarum

**Bæði analytikarar og handilsfólk trúgva nú, at oljuprísurin kann røkka 60 dollarum fyri tunnuna**

OLJUPRÍSUR

Tíðindastovan Bloomberg hevur prátað við fleiri analytikarar og oljuhandlarar, sum eru farnir at trúgva, at oljuprísurin kann røkka teimum 60 dollarunum fyri tunnuna.

Hósnáttina setti oljuprísurin nýtt met, tá hann fór upp um 52 dollarar fyri tunnuna og í New York varð handlað fyri 52,24 dollarar.

– Fáa vit ein kaldan vetur, fer prísurin enn longur upp, sigur høvuðsstrategurin fyri ráðvørur hjá Goldman, Sachs & Co. í New York. Steve Strongin. Saman við Steve Taylor frá New West Petroleum ikki hann vil útiloka, at tunnukostnaðurin fer upp um 60 dollarar.

Teir báðir analytikararnir síggja fyri sær, at teir 60 dollararnir verða náddir, um so er, at kríggj, búskapartrupulleikar ella ódnir aftur fara at gera um seg.

Tað er øktur eftirspurningur, ið saman við órógv á oljumarknaðinum, hevur fingið prísin uppeftir seinastu vikurnar. Búskaparliga framgongdin í heiminum hevur havt týdning fyri eftirspurningin, og við køldum vetrarmánaðum fyri framman er eftirspurningurin neyvan vorðin minni, skrivar Føroya Sparikassi á heimasíðu síni.

*Kelda: www.sparikassin.fo*

# Miðflokkurin liðugur við uppstillingina

Valevnalistin til býráðsvalið í Tórshavnar kommunu hjá Miðflokkinum er nú klárur. Flokkurin stillar upp 10 valevni. Teirra millum Jenis av Rana, tingmann floksins

Jenis av Rana hevur fyrr havt sæti sum varamaður fyri Petur í Gong á uttanflokkalistanum. Hetta var í valskeiðnum frá 1992-1996. Í 1996 fór uttanflokkalistin í søguna, og Jenis av Rana saman við øðrum stillaðu upp fyri Miðflokkin uttan tó at vinna sessin aftur - og tað hevur flokkurin ikki havt síðani.

Fyri at fáa umboð valt í Tórshavnar kommunu skal ein listi hava 1/13 part av atkvøðunum - ella 7,7% av atkvøðunum. Við seinasta kommunuval skuldu 723 atkvøður til fyri at røkka einum sessi. Tá fekk Miflokkurin 488.

### Listin hjá Miðflokkinum er hesin:

Sámal í Gong, Tórshavn, arbeiðstakari
Svenhild Haraldsen, Hoyvík, sjúkrarøktarfrøðingur
Egin Henriksen, Tórshavn, EDV-programmør
Allan Hjaltalin, Tórshavn, sølumaður
Frank Jacobsen, Tórshavn, bussførari
Charlotta á Váli Olsen, Tórshavn, Stovnsleiðari
Dánjal Petersen, Kollafjørð, trúboðari/arbeiðstakari
Jenis av Rana, Tórshavn, lækni
Marnar á Skúr, Nólsoy, avl. pensionistur
Elin N. W. Tausen, Argir, lesandi




BRILLUKONTO




Hvørjar skal eg velja?

Hví taka ta stóru avgerðina bara einaferð?
Her bjóða vit tær eina heilt nýggja tænastu, tá ið tú keypir brillur, nevniliga eina brillukonto.
Við eini brillukonto kanst tú keypa í dag, og gjalda, sum tær passar best. Einki útgjald og eingin renta. Tað kostar einki eyka at keypa brillur við eini brillukonto. Veljast kann tað brillustell og tey brillugløs, tú ynskir.

NIELS L. ARGE
BRILLUR

KONGABRÚGVIN, TÓRSHAVN, TLF. 311731

stephanssons hús